# Nógvur laksur

Tað hevur ligið væl fyri hjá stuttleikaveiðimonnunum, sum veiða laks í teimum íslendsku áunum. Serliga tann seinni parturin av summarinum hevur vignast væl. Í Ytru Rangá, sum er ein av teimum bestu laksaáunum í Íslandi, hava teir veitt meiri enn 5.000 laksar, og teir, sum skipa fyri, vænta at koma upp í 6.000 laksar, áðrenn veiðitíðin endar tann 20. oktober. Morgunblaðið veit at siga, at teir, sum hava veitt í øðrum áum, hava eisini fingið væl av laksi í summar.



*Tað hevur verið hugaligt við laksatráðuni í Íslandi í summar (Mynd: Morgunblaðið)*

# Nevndarlimur keypir partabrøv

Mortan Johannesen, nevndarlimur í Atlantic Petroleum, hevur nú økt um sín ognarpart í felagnum. Í gjár kom fráboðan frá keypsskálanum um sonevndan insider-handil, har Mortan hevur keypt 3.104 partabrøv á 550 kr. Eitt samlað keyp á 1,7 mió kr. Samlaði ognarparturin hjá Mortani Johannesne í felagnum er nú 40.000 partabrøv. Við dagsins kursi svarar hetta til eitt virði á 58,4 mió kr.

# Føroyskt oljuævintýr í Aberdeen

**Fleiri føroyskar fyritøkur vóru umboðaðar á stórari orkuráðstevnu í Aberdeen í síðstu viku**






*Hetta er fyrstu ferð, at nýggja SamVit fyrireikar føroyska luttøku á oljuráðstevnu. Her nakrir av føroysku luttakarunum*

OLJUMESSA
*Rógvi Absalonsen*

Offshore Europe er heitið á einari av teimum heilt stóru orkuráðstevnunum í Europa, ið verður hildin annaðhvørt ár í Aberdeen. Talið av fyritøkum við básum í ár var 1.400, og talið av vitjandi var upp ímóti 30.000, upplýsa fyrireikararnir. Tí skuldi hetta verið eitt sera upplagt høvi hjá føroyskum fyritøkum at skapa samband við týðandi útlendskar orkuframleiðarar og annars bara at upplýsa umheimin um føroyska oljuvinnu sum heild.

Tað var SamVit og Oljuvinnufelagið, sum høvdu fyrireikað og samskipað føroysku umboðanina á ráðstevnuni, meðan Petur & Petur stóðu fyri sjálvum sniði og útsjónd á føroyska básinum. Føroyskar fyritøkur vóru bjóðaðar við og harav høvdu tíggju sagt ja til at vera við á ráðstevnuni. Harafturat hevði SamVit sett nøkur básfólk, sum høvdu til uppgávu at svara spurningum hjá teimum vitjandi og annars at vísa á, hvørjar tænastur føroysku fyritøkurnar hava at bjóða.

Gunnbjørn Joensen, stjóri á Thor Offshore, sigur seg hava fingið nógv burturúr ráðstevnuni, og at serliga hevði hann roynt at fingið samband við útlendskar fyritøkur, sum til ber at samstarva við í framtíðini.

### Klár til næsta stig

Eisini Eli Lassen, stjóri á Atlantic Supply Base í Runavík letur heilt væl at. Hann vísir á, at tað er sera umráðandi at leggja sær eina ætlan, tá ið ein leitar sær á tílíkar stórar ráðstevnur. Tað hevði hann gjørt hesaferð, og tað hevði eydnast avbera væl. – Eitt, sum